# Ráðstevna millum lond við video

**Tað ber til at savna fólk úr fýra londum – uttan at nakar ferðaseðil verður keyptur. Hósdagin sótu seks fólk í Norðurlandahúsinum og hugdu upp á stórskiggjan, har ein norsk kvinna helt fyrilestur. Hetta er fyrsta føroyska royndin við videoráðstevnu.**

KATRIN PETERSEN



Telefonverkið fer at seta eitt høli av, sum fyritøkur og onnur kunnu brúka, tá tey ætla at hava videosamband við umheimin. NORA brúkti hesu ferð salin í Norðurlandahúsinum. Mynd: Kalmar Lindenskov

Norrønt Atlantssamstarv skipaði fyri videoráðstevnu hósdagin. Við eitt borð í Norðurlandahúsinum sótu seks føroyskir luttakarar. Framman fyri tey stóð eitt sjónvarp við einum upptøkutóli omaná. Á skiggjanum sóu tey hinar luttakararnar, sum sótu í Grønlandi, Íslandi og tvinna staðni í Noregi. Skiggin var býttur í fýra, so øll sóust, meðan orðaskifti var.

Hetta er fyrsta royndin hjá Telefonverkinum við videoráðstevnu.

– Tað er lættari at tosa við onnur, tá tú sært tey. Ein stórur partur av samskifti er jú kropsmál. Her kanst tú eisini vísa skjøl og tekna upp fyri fólki, meðan tú tosar, sigur Poul Henrik Poulsen av Telefonverkinum.

Hósdagin var tað NORA – Norrønt Atlantssamstarv – sum brúkti videotøknina. Tveir fyrilestrar vórðu hildnir, báðir um, hvussu video kann nýtast. Ein íslendskur verkfrøðingur segði frá um telemedisin, og ein norskur fakkonsulentur tosaði um fjarundirvísing við nýtslu av video.

### Bíligari enn ferðaseðil

Henda ráðstevnan verður helst ikki tann einasta. Telefonverkið hevur fingið nógvar fyrispurningar um henda háttin at hittast.

– Tú skalt ikki samanbera hetta við at tosa saman í telefon, men við, hvat ein ferðaseðil kostar. Skulu fólk úr trimum londum hittast, kann tað vera ein stór útreiðsla. Tá er hetta nógv bíligari, sigur Poul Henrik Poulsen.

Hann hevur ikki enn nakran føroyskan prís, men upplýsir, at í Noregi kostar tað 510 krónur at brúka videosamskifti í ein tíma innanlands.

Hetta merkir tó ikki, at fólk fara at halda uppat við at fara á »veruligar« ráðstevnur.

– Hetta kann ikki helt koma í staðin fyri at vera í sama rúmi. Tað krevur, at man kennir eitt sindur til hvønn annan – og útgerðina. Men tá er tað eisini ein stórur fyrimunur, sigur Poul Henrik Poulsen.

Hósdagin vóru onkrir trupulleikar við sambandinum, so fyrilesturin úr Noregi varð seinkaður. Men annars lótu fyrireikararnir væl at.


40-ÁRA STARVSDAGUR

Í samband við at

Andrew Godtfred prokuristur marknaðarleiðari

hevur 40-ára starvsdag, bjóðar P/F Føroya Shell til móttøku á skrivstovuni á Viðarnesi

mánadagin 26. mai frá kl. 15 til 17.

Shell


# Stór ráðstevna setir olju inn í ein størri samanhang



**Samspæl millum olju, fisk og ídnað er heitið og evnini, sum verða umrødd á eini stórari oljuráðstevnu 2. til 3. juni.**

GEORG L. PETERSEN

Hesaferð er tað Saga Petroleum, sum saman við Føroya Oljuídnaði skipar fyri oljuráðstevnu. Á stevnuni verður m.a. eisini fyrrverandi norski fiskimálaráðharrin, Jan Henry T. Olsen.

Fyri ikki so langari tíð síðan var tað Amerada Hess samtakið, sum saman við Føroya Oljuídnaði skipaði fyri stórari oljuráðstevnu í Norðurlanda-húsinum. Nú koma norðmenn og Saga Petroleum hendavegin at greiða okkum frá norskum royndum.

Noreg stóð eisini uttan royndir, tá oljuvinnan skuldi leggjast til rættis. Spurningarnir vóru teir somu sum tóku seg upp har, sum her hjá okkum. Hvussu við fiskinum, umhvørvinum, lokala vinnulívinum, eini útgerðarstøð og hvørji krøv skulu setast oljuvinnuni.

Føroysk og norsk umboð greiða frá hvørjum einstøkum evni á stevnuni.




**Allir brúktir og nýggir billutir!!**

Bilendurnýtsla í 46 ár

Flutningur til Føroya: Dagliga v/ posti/-flogposti/ EMS/við skipi/ Flogfrakt.

Fullur reklamatiónsrættur á øllum leveraðum vørum.

HJØRRING AUTOOPHUG

Fuglsigvej 58
DK-9800 Hjørring

Telefon 098924266
Telefax 098924401

DAG
Dansk Autogenbrug

*Limur í Foreningen Dansk Autogenbrug*


# Vestmenningar fáa trø sum tøkk

**Skúlabørnini og almenningurin rudda alla bygdina, og húski og virki hava fingið boð um at rudda sítt øki.**



Í Vestmanna eru øll eygu vend móti ruski og óruddi. Í gjár og í dag verður øll bygdin ruddað.

Skúlabørnini í Vestmanna eru farin út at rudda saman við lærarunum, arbeiðsfólkinum hjá kommununi og almenninginum. Haraftrat hava húskini og virkini í bygdini fingið boð um at rudda sítt øki.

Nevndin fyri viðarlundina í Vestmanna, kommunan og skúlin skipa fyri ruddingardøgunum. Á middegi í gjár vórðu øll, sum rudda, boðin í ítróttarhøllina at fáa okkurt til matna.

Fyrireikararnir heita á fólk um at seta allar posar og alt órudd út til vegin áðrenn klokkan 15 í dag. Tá fara bilar at koyra runt og taka burturkastið.

### Øll fáa ókeypis trø

Tá ruddingin er av í dag, fer Vestmanna Hornorkestur, ið júst er komið aftur av konsertferð í Noregi, at ganga skrúðgongu kring bygdina. Skrúðgongan endar við ítróttarhøllina klokkan 15, tá viðarlundin skipar fyri stórum tiltaki.

Øll húski í Vestmanna, ið hava áhuga, fáa har ein ókeypis pakka við fimm ymsum trøum og runnum í.

Finnbogi Joensen, sum er formaður í nevndini fyri viðarlundina í Vestmanna, sigur, at fyribils hevur viðarlundin útvegað sær 100 pakkar. Hann væntar, at tað verður nóg mikið, men skuldi tað verið ov lítið, koma fleiri pakkar. Tí øll, sum hava áhuga, skulu fáa.

– Hetta er ein tøkk fyri, at fólkið hevur stuðlað so væl arbeiðnum við viðarlundini, og samstundis er hetta ein liður í at fríðka bygdina, sigur Finnbogi Joensen.

Tey húski, ið vilja hava fleiri enn tey fimm trøini í pakkanum, hava møguleika at keypa trø og runnar. Viðarlundin fer eisini at selja trø og runnar í ítróttarhøllini í Vestmanna í dag. Har verða eisini tombola, fiskidammur, eydnuhjól, kaffisøla og annað.


NAVNA- OG BÚMERKJAKAPPING

Seinri í ár leggja SMS Foto & Fløgur saman við Klokkuni, soleiðis at skilja, at allar 3 eindirnar verða undir einari lon í SMS, eitt spennandi og hugvekjandi konsept.
Í hesum sambandi vilja vit hava eitt gott, lætt navn og búmerki fyri tær 3 eindirnar.

Navnið skal ímynda vøruúrvalið, ið er í teimum 3 eindunum:
FOTO – Myndaarbeiði, fototól v.m.
FLØGUR – Alt innan tónleik v.m.
KLOKKAN – Ur, smykkur, design v.m.
Vit ímynda okkum eitt viðkomandi lætt føroyskt navn við búmerki.

Send títt uppskot innan 31. juli til:
NAVNA & BÚMERKJAKAPPINGIN
Postboks 1057
FR–110 Tórshavn

VINNINGARNIR:

1. Eitt vikuskifti í Keypmannahavn fyri 2 pers. á Copenhagen Star Hotel v/morgunmati.
Flogið verður við Atlantsflog *Atlantic Airways*

Eitt OLYMPUS fototól mju II við filmi og Royal dygdar framkallan.
mju II: tað nýggja og minsta fototólið frá Olympus við Auto focus. Tekur sera góðar myndir og er lætt at nýta.



Tvey OLYMPUS móta-ur. SMS FOTO

2. OMEGA professionelt kavara-ur
Stál v/dato. Skrúvukrúna og helium-ventilur. Skøvufrítt safirglas.
Vatntætt til 300 m.



Klokkan

3. Canon videokamera
Eitt veruligt familjucamera, sera lætt at nýta, og vigar bert 1 kg. Canon UC3000 –eitt tað besta videokameraið til at festa tínar bestu løtur á videobond.
Við fylgjur taska og videobond



SMS FOTO

SMS FOTO & FLØGUR
Tlf. 19820 • Fax 14955

Klokkan
Tin Ur- og Gullsmiður - SMS - Tlf. 10606